# BECKHAM OYÐILEGGUR SÆR RYGGIN




*Soleiðis kenna fótbóltsfjepparar David Beckham – liggjandi langt á liðuna við sínum eyðkenda sparkiteknikki...*

Enski fótbóltsspælarin David Beckham er viðagitin fyri síni tiltiknu skot. Hansara heilt serligi sparkiteknikkur hevur gjørt hann heimskendan, men nú er líkt til, at hesin teknikkur leggur so stórt og áhaldandi trýst á kroppin hjá Bekcham, at hann hevur fingið trupulleikar við rygginum. David Beckham segði nú um dagarnar við bretska blaðið The Sun, at hann má fáa pínustillandi sproytu áðrenn og eftir dyst.

Læknarnir í Real Madrid, har Beckham spælir, siga, at tað er tann serliga støðan, sum kroppurin hjá honum kemur í, tá hann avleverar og skjýtur, sum hevur við sær pínuna í rygginum.

Beckham hevur síðani hann var smádrongur vant ótroyttiligur at sparka bóltin á sín serliga hátt. Hann er blivin burtur úr góður at skjóta fríspark, og kropsstøðan hjá Beckham er so eyðkend, at Adidas hevur brúkt hana sum grundarlag fyri einum serligum logo til onkrar av sínum fótbóltsskóm.



*... men nú er tað eisini komið fram, at júst tann serliga støðan, sum Beckham kemur í, tá hann skjýtur bóltin, gevur honum pínu í ryggin. Myndir: Scanpix*

## Gongur væl hjá Mew og hinum



Sølan av donskum popp og rocktónleiki er størri, enn hon hevur verið nógv tey seinastu árini. Fyrr í ár kundi plátuvinnan boða frá, at fyri fyrstu ferð nakrantíð vóru fleiri danskar útgávur enn útlendskar seldar í donsku fløgubúðunum, og nú vísir ein nýggj uppgerð, at samlaða sølan er munandi hægri í ár enn somu tíð í fjør. Jyllands-Posturin hevur kannað tølini, og sambært teimum eru umsetningurin í søluni av donskum tónleiki 10 milliónir størri higartil í ár samanborið við somu tíð í fjør. Nøvn sum Mew, Anne Linnet og Lis Sørensen hava selt væl í ár, og roknað verður við stórari sølu seinni í ár hjá bólkum sum Outlandish, TV-2, Gnags og Jokeren.

## Tøfting sigur frá øllum



Danski fótbóltsspælarin Stig Tøfting hevur skrivað sína sjálvsævisøgu, og hendan bók er meira erlig enn slíkar bøkur plaga at vera. Tøfting hevur verið ígjøgnum nógv í sínum lívi, og hann greiðir opið frá øllum í bókini. Pápi Tøfting skjeyt mammu hansara og gjørdi síðani sjálvmorð, tá ið Tøfting var smádrongur, Tøfting misti fyri nøkrum árum síðani ein son, sum bara var 26 dagar gamal, og Tøfting hevur sitið í fongsli fyri harðskap. Umframt persónligu hendingarnar hevur hann verið ein av fremstu fótbóltsspælunum í Danmark í nógv ár, og í bókini greiðir Tøfting millum annað frá, hvat hann hevur fingið í løn í teimum ymsu feløgunum, hann hevur spælt fyri.
***(Mynd: Scanpix)***

## Kappaðust um bestu tatoveringina



Tað verður kappast í bæði einum og øðrum, og fyrr í vikuni var MBK Tattoo Contest í Bangkok. Fólk – bæði kvinnur og menn – við øllum hugsandi tatoveringum vóru við í kappingini, og mánadagin vístu fólkini seg fram í einum keypsskála í Bangkok. Næsta 60 fólk vóru við í kappingini, og tað vóru nógvar stórar og sermerktar tatoveringar at síggja á fólkunum. Fólk munnu neyvan verða á einum máli um, hvørt hetta er kropsprýði ella ikki, men í øllum førum eru tað tey, sum gera nógv av við at tatovera kroppin hjá sær.
***(Mynd: Scanpix)***

